listastevna føroya 2001

# Listarlig frásøgn

**Don Juan fra Tranhuset er ein øðvísi, spennandi og nýskapandi sjónleikur. Ein blandingur av føroyskum og donskum gevur eitt úrslit, ið skjótt gerst ein uppliving, har allir sansirnir verða tambaðir út**



UMMÆLI
*Heri á Rógvi*
*Myndir: Jógvan á Høvdanum, yngri*

Hóast umstøðurnar eru munandi betri nú enn fyrr, so er ein sjónleikur altíð ein forkunnugur biti. Serliga tá leikurin hevur okkurt slag av føroyskum tilknýti.

Leikurin hetta kvøldið hevur so sanniliga eisini føroyskt tilknýti. Rithøvundurin er mestir hin kendasti føroyski rithøvundurin nakrantíð, William Heinesen. Hóast hann er farin av hesi verð, so stendur hansara skaldskapur, eins og hansara list, eftir; væl goymt hjá teimum, sum hava fingið innlit í hansara sjáldsama spennandi heim.

Don Juan fra Tranhuset er ein styttri søga hja William Heinesen, sum útkom í einum stuttsøgusavni í sjeytiárunum. Søgan fer fram í tí gamla føroyska samfelagnum í endanum av 19. øld. Tað er ein skipsbrotið maltesi, sum rekur á land úti í Koltri. Beinanvegin bera fólk tokka til hansara, og áðrenn tú veitst av, er ein longri listarliga fortald frásøgn sett ígongd.

Tað verður eisini lagt fyri við at søgan verður endurgivin. Í sjálvari stuttsøguni verður byrjað við at siga frá um staðið, landið og samfelagið, søgan fer fram í. Um tað var við leiki fyri eyga er ikki gott at vita, men í øllum førum byrjar stuttsøgan við at siga frá um plássið, haðani søgan verður eygleidd. Hetta fyrsta pettið er ikki við í leikinum, men tað gerst kortini greitt, at vit eru í serstakum ævintýr heimi.

Tær tríggjar á pallinum siga frá søguni. Ein frásøgn fortald av trimum kvinnum, sum ikki eru úr samtíð søgunar. Tær tríggjar eru okkara eygu og oyru, og tær skulu siga okkum alt, sum vit, meðan leikurin fer fram, hungra eftir.

Talan er um ein leik, har samanspælið er hornasteinurin. Samanspælið millum leikararnar á pallinum og tónleikaran, men eisini samanspælið millum leikarar og áskoðararnar, tá hetta er ein leikur, har áskoðarin situr við nøsini millum leikararnar.

## Tónleikur, pallmynd

Don Juan fra Tranhuset spæla tríggir leikarar. Eisini er ein tónleikari við á pallinum, og hansara partur liggur so avgjørt ikki eftir. Leikararnir spæla allir væl, og serliga í teimum meira dramitisku pørtunum fær leikurin ein heilt sermerktan intensitet.

Tey fýra eru á pallinum allan leikin. Tey fylla pallin sera væl, og tað er kanska eisini her, at tann størsta styrkin hjá leikinum liggur. Pallmyndin verður frálíka væl nýtt til veruliga at seva lív í frásøgnini, tí tað er fyrst og fremst ein frásøgn, sum verður fortald á pallinum.

Pallurin er rímiliga stórur, og tær tríggjar reika runt sum fyri lívinum. Við tónleikinum verður huglagið skapt, og tað er eisini ein sera gjøgnumførd heildarmynd, ið leikarar, tónleikur og pallur skapa. Tað eru ikki tey størstu leiktjøldini sum eru karmar um leikin, men í einum samanspæli millum leikarar, tónleik og ljós verður bygt uppfyri, at tú sum áskoðari kann skapa myndirnar í egnum hugaheimi.

Tónleikurin verður spældur á klaver og sag. Tónleikurin er eitt fragd fyri oyra. Hóast tónleikarin allan leikin situr á pallinum, so er tað ikki hann, ið tú sum áskoðari leggur merki til. Tað er eisini tað, at framførslan fyllur so mikið lítið, sum veruliga setur krøv til leikararnar, men tá tær klára tað somikið væl, verður tað ein fragd fyri allar sansir.

## Hitt fremmanda

Leikurin um skipsbrotna Don Juan tekur støðu í nøkrum viðurskiftum, har fleiri eru serføroysk. Frá byrjan av verður tann meira erotiski og kynsligi parturin førdur fram, og hesin parturin fyllur eisini ein munandi stóran part av leikinum. Frásøgnin ber oftani á ein erotiskan og sterkan bógv. Hetta vísir eisini eina styrki hjá leikarunum, og vísa allar fyrimyndarlig evni í støðum. Tað er tó sum um, at leikurin kundi verið eitt sindur sterkari í støðum, tá girndin og tær meira intensu løturnar koma fyri.

Tað er ikki talan um annað enn erotik, og hesin er kanska nakað sjáldsamur, men framvegis vísir tað eisini ein ráleika hjá leikarunum, og leikurin er eisini fyri tað nógv bygdur rundan um hetta. Leikararnir eru allar klæddar í búnum, sum hóska seg til kensluborna og erotiska huglagið. Talan er als ikki um pornografi á nakran hátt, og ein hvør, sum væntar tað, verður inniliga skuffaður. Heldur byggir leikurin á nærliggjandi forteljarakynstur, sum William Heinesen hevur orðað, og tey fýra hava sett nýggjan dám á.

Leikurin, sum er einar 70 minuttir til longdar, hevur hitt fremmanda sum eitt gjøgnumgangandi tema. Alskurin til nýggjar og spennandi upplivingar, eitt innilæst siðbundið føroyskt samfelag eins og reindyrkað greði verða kveikt fram av frammanda gestinum. Hóast leikurin byggir á eitt eldri samfelag, so eru fleiri av evnunum altíð hóskandi.

Hetta er veruliga ein leikur, ið kveikjur lív í gamla kynstri at siga frá. Ein deiliga rá frásøgn og uttan at leikararnir ganga uppá kompromis við seg sjálvi. Ein sera góður sjónleikur.



## Eykasýningar

Áhugin fyri leikinum Don Juan fra Tranhuset hevur verið sera stórar. So stórur, at útselt hevur verið til sýningarnar í Havn. Í tí sambandi hava fyrireikararnir avgjørt at hava tvær eykasýningar. Onnur var í gjár (týskvøldið), og hin verður í kvøld. Báðar eykasnýningarnar byrja kl. 21.30. Atgongumerki kunnu keypast á Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum.

*-hr*



# Vágatunnilin: Eru frammanfyri tíðina

**– Gongur sum nú, verður tunnilin skotin ígjøgnum longu í ár, sigur Klæmint Weihe, formaður í nevndini fyri Vágatunnilin**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*



*Arbeiðið upp á undirsjóvartunnilin hevur gingið strúkandi seinastu tíðina. Gongur sum higartil, hava teir sprongt ígjøgnum í ár*

Tað gongur strúkandi at gera undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi.

So strúkandi, at teir í løtuni eru eitt sindur frammanfyri tíðarætlanina, hóast eitt verkfall legði arbeiðið lamið í fleiri vikur í vár.

Klæmint Weihe, formaður í nevndini fyri Vágatunnilin, sigur, at hesa seinastu tíðina hava teir borað upp í 80 metrar um vikuna, tá ið teir hava borað mest- og tað er nógv.

– Fjallið streymoyarmegin er blivið heilt gott at bora í, so nú er rættilig ferð á arbeiðnum.

Hann sigur, at sostatt hava teir longu fingið tað innaftur, sum teir mistu av verkfallinum í vár.

Nevndarformaðurin sigur, at higartil hava teir borð 1.725 metrar frá Streymoyarlandinum og 935 metrar frá Vágalandinum, ella tilsamans 2.660 metrar.

Sostatt eru teir komnir væl meiri enn í helvt, tí tilsamans er tunnilin 4.900 metrar langur. Sostatt eru góðir 2.200 metrar eftir at bora.

Klæmint Weihe sigur, at tískil eru góð útlit fyri, at tað tað verður liðugt at bora tunnilin longu í ár.

– Klára vit hereftir at bora 55 metrar í miðal um vikuna, koma vit ígjøgnum longu í ár, sigur hann.

Og tað skuldi hampiliga góð útlit verið fyri.

– Eftir teimum jarðfrøðiligu kanningunum, sum eru gjørdar, skuldi fjallið, sum er eftir, verið sama slag sum tað, vit hava borað í tað seinastu tíðina, tvs, at tað skuldi verið rættiliga gott at arbeitt í, tað, sum eftir er.

Klæmint Weihe sigur, at teir sostatt eru komnir yvirum tann partin á Streymoyarlandinum, har fjallið var ringt at bora í.

Kortini verða teir noyddir til at leggja upp fyri, tí hóast nágreiniligar jarðfrøðiligar kanningar eru gjørdar, kunnu rivur og aðrir óvæntaðir trupulleikar stinga seg upp í fjallinum frammanfyri, sum gera, at boringin ikki fer at ganga líka skjótt, sum hon ger nú. Annars sigur hann, at arbeiðið hevur gingið gott og at onki álvarslig óhapp hava verið, okkurt arbeiðsfólk hevur meiðslað seg, men talan hevur bert verið um smávegis snuddir.

# Nú verður tornið í Øravík tikið burtur

**SEV fer nú at flyta tornið burtur frá vegnum. Tá ið tunnilin ímillum Øravík og Hov verður gjørdur, skal alt vegastrekkið í Øravík harafturat leggjast heilt av nýggjum**

*Áki Bertholdsen*

Nú verður tað nógv umstrídda SEV-tornið við vegin í Øravík, tikið burtur. SEV hevur fingið byggiloyvi til eitt nýttt torn longur inni í dalinum og sostatt verður tornið við vegin, sum hevur elvt til so mikla kvøl, tikið burtur.

SEV upplýsir, at farið verður undir arbeiðið nú og at tornið verður tikið niður í heyst.

SEV hevur arbeitt í langa tíð við at fáa tornið flutt, men pappírsarbeiðið tekur tíð og tað er ikki fyrrenn stutt síðani, at byggiloyvið og aðrar fyrireikingarnar eru komnar undir land.

Tað er í samstarvi við Landsverkfrøðingin, at SEV nú tekur tornið niður og Landsverkfrøðingurin rindar ein part av útreiðslunum.

SEV hevur ikki ábyrgdina av ferðslutrygdini í landinum og tí er samstarv tikið upp við SEV um at flyta tornið.



*Skjótt verður tað umstrídda SEV-tornið við vegin í Øravík søga. Tað stendur bara ein metur frá vegjaðaranum, men nú verður tað flutt. Seinast eitt óhapp hendi har á staðnum, var í farnu viku, tá ið ein bilur, sum ikki kláraði svingið, knústust ímóti torninum.*

## Hevur virðið

Umstrídda SEV-tornið í Øravík er bygt í 1928 og er tískil rættiliga gamalt. Tað hevur eitt serligt byggisnið og ætlanin var tí at varðveita tað. Av tí sama varð tað umvælt fyri nøkrum árum síðani.

Klæmint Weihe, stjóri á SEV sigur, at ætlanin var at varðveita tornið sum eitt minni.

– Tornið er serstakt. Torn av hesum slagi vórðu ikki gjørd aðrastaðni, enn í Suðuroy og tað hevur bæði søguligt og byggilistarligt virði.

Men fyri tað, um tornið nú skal takast niður, er ikki vist, at ætlanin at varðveita tað, fer fyri skeytið.

Í staðin fyri at taka tað niður, verður møguleikin kannaður at flyta tað burturfrá vegnum og at varðveita tað. Letur tað seg ikki gera innanfyri rímuligt mark, verður tað brotið niður, tí burtur frá vegnum skal tað í øllum førum.

## Leggjast av nýggjum

Seinni verða enn fleiri tiltøk sett í verk, sum skuldu bøta um ferðslutrygdina á staðnum. Landsvegurin í Øravík verður nevniliga tikin uppí arbeiðið, tá ið nýggjur tunnil verður gjørdur ímillum Øravík og Hov, nær tað so verður.

Hermundur Michelsen hjá Landsverkfrøðinginum í Suðuroy, sigur, at tá ið tunnilin verður gjørdur, er ætlanin at leggja allan vegin í Øravík heilt av nýggjum.

– Ætlanin er at leggja allan vegin í ein javnan boga runt alla víkina í Øravík. Summastaðni verður vegurin sostatt fluttur eitt sindur niðaneftir og aðrastaðni verður nýggi vegurin lagdur eitt sindur niðanfyri vegin, sum er.

## Nógv kjak

Tað hevur elvt til nógv kjak, at eitt slíkt torn skal standa beint við veg við nógvari ferðslu. Hartil stendur tað so illa, at tað er beint í einum svingi.

Nógv hava ført fram, at tað er ein álvarligur vandi fyri ferðsluna og tað eru eisini fleiri bilar, sum eru endaðir í torninum, tá ið teir av onkrari orsøk, ikki hava klárað svingið.

Serliga eftir eina ferðsluvanlukku í september í 1999, sum kravdi trý mannalív, gjørdust tað eitt fólkakrav í Suðuroy at okkurt varð gjørt, har hundraðtals fólk skrivaðu undir eitt krav um at at bøtt varð um ferðslutrygdina á plássinum.

Men tað fánaði skjótt burtur aftur og ikki fyrrenn nú ein bilur aftur endaði í torninum í farnu viku, tók kjakið seg uppaftur.

Í blaðnum í gjár helt Ráðið fyri Ferðslutrygd eisini avgjørt, at okkurt átti at verið gjørt fyri at bøta um ferðslutrygdina á plássinum.

Men í dag ber so til at upplýsa, at SEV og Landsverkfrøðingurin í langa tíð hava arbeitt við at fáa tornið flutt og at tað nú er komið so langt, at tað verður gjørt í ár. Samstundis verður allur vegurin lagdur av nýggjum seinni.